2009-0617/12

**SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI**
**MATR. NR. 1431 VIÐ VARÐAGØTU**

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. grein.

## ØKI SAMTYKTARINNAR

**§1.** Økið ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfestu kortskjølum I og II dagf. 26.02.2009, matr. nr. 1431 og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir nevndu ogn.

## FRÁGREIÐING UM ØKIÐ

**§2.** Endamálið við hesi serstøku byggisamtykt er at skipa bústaðarbygging á økinum.

Stk. 2. Útstykkingin við Varðagøtu 79A, B og C og 81A, B og C er 1953 m$^2$ til støddar og liggur í einum A1 øki, sum sambært almennu byggisamtyktini kann brúkast til bústaðir.

Stk. 3. Útstykkingin hevur 6 grundøkir til 2x3 samanbygd hús, ið standa hvør síni megin eitt felagsøki/tún, sum bindur býlingin saman og verður savnandi fyri útstykkingina.

Stk. 4. Hvørt hús kann bert hava eina íbúð og vera bústaður fyri eitt húski.

Stk. 5. Atgongd verður til øll húsini frá felagsøkinum/túninum, har bilar kunnu ferðast undir skipaðum viðurskiftum.

Stk. 6. Sambært kap. V, §1, stk. 2a í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu verða øki roknað fyri avløgd til veg, tá ið *"almenningurin ella fleiri enn ein luteigari hava rætt til ferðslu á økinum"* og í §2, stk. 1f stendur *"tá ið serstakar umsóknir tala fyri, kann verða loyvt at gera undantøk frá ásetingunum um vegabreidd"*.

Stk. 7. Grundøkini eru uml. 230 - 300 m$^2$ til støddar. Samlaða grundøkið er uml. 300 m$^2$ fyri hvørt hús, harav uml. 20 - 70 m$^2$ verða lagdir til felagsøki/tún.

Stk. 8. Sambært kap. IV, §5, stk. 2. í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu skulu *"grundøkini vera 300 m$^2$ fyri hvønn partin av tvíhúsum, ketu- ella raðhúsum. Ein partur av minstuvíddini kann verða lagdur sum felagslendi og sum bilstøðil"*.

## NÝTSLA ØKISINS

**§ 3.** Økið skal nýtast til bústaðir. Eisini er møguligt at hýsa minni virksemi, ið eru flokkað í umhvørvisflokki 1 í Umhvørvisflokking fyri Vinnustykkir í Tórshavnar kommunu, samtykt av býráðnum 19. februar 2009, har tað verður mett ráðiligt av býráðnum.

Stk. 2. Hetta virksemið skal avmarkast soleiðis, at tað ikki førir við sær nakra ferðslu frá starvsfólki ella viðskiftafólki til og frá økinum.

Stk. 3. Eitt eigarafelag skal skipast fyri útstykkingina, har allir eigarar skulu vera limir.

## BYGGING, STØDD, STAÐSETING OG SKAPILSI HÚSANNA

**§4.** Byggistigið má í mesta lagi verða 0,3

Stk. 2. Nettunýtslustig má í mesta lagi verða 0,3

Stk. 3. Á hvørjum grundøki kann byggjast eitt raðhús, sum bústaður fyri eitt húski, í einari hædd og kjallara umframt eitt úthús á 10 $m^2$.

Stk. 4. Bilhús ella bilskýli kann ikki byggjast í økinum.

Stk. 5. Grundøkini skulu vera opin ímóti felagsøki og mugu ikki girðast inni

## ÚTSJÓND HÚSANNA

**§5.** Øll bygging í økinum, sum byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggifulltrúan og góðkennast av eigarafelagnum fyri útstykkingina. Hetta skal eisini tinglesast í skeytið fyri allar ognirnar.

Stk. 2. Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

## BYGGING IÐ ER

**§6.** Henda byggisamtykt er ikki til hindurs fyri, at núverandi lóglig bygging verður varðveitt, ella at hildið verður fram við lógligari nýtslu av eini ogn.

Stk. 2. Ikki er loyvt at vaksa um hús við at byggja um, ella at taka tey til aðra nýtslu ímóti reglunum í byggisamtyktini.

## BYGGINGARMYNDULEIKI OG ÁTALURÆTTUR

**§7.** Byggingarmynduleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR Í HENNI.

**§8.** Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

| INNLENDISMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr.: | 1830-023/09 |
| Góðkent: | 17/9-09 |
| Dagfesting: | 17/9-09 |
| Váttað: | [signature] |




**P7 - 341,9 m2. Frámatrikulerað vegøki.**

**Tinglisið brúksøki hjá øllum eigarum. Innhegning ikki loyvd.**

**Tórshavnar Kommuna,** Vaglið 1, FO-100 Tórshavn, tlf. +298 30 20 10, fax: +298 30 20 11, E-mail: torshavn@torshavn.fo

# Serstøk byggisamtykt fyri Varðagøtu

**2 ferðir 3 samanbygd hús á matr. nr. 1431, Tórshavn**

**Matrikulætlan**

Broytt:

| | |
|---|---|
| Mál nr.: | 2009-0617 |
| Teknað: | KF/AMDO |
| Kannað: | |
| Dagfest: | 26.02.2009 |
| Mát: | - |

Tekning nr.: 02




**P7 - 341,9 m2. Frámatrikulerað vegøki.**

**Tinglisið brúksøki hjá øllum eigarum. Innhegning ikki loyvd.**

**Tórshavnar Kommuna,** Vaglið 1, FO-100 Tórshavn, tlf. +298 30 20 10, fax: +298 30 20 11, E-mail: torshavn@torshavn.fo

# Serstøk byggisamtykt fyri Varðagøtu

**2 ferðir 3 samanbygd hús á matr. nr. 1431, Tórshavn**

**Matrikulætlan við mátum**

| | |
|---|---|
| Mál nr.: | 2009-0617 |
| Teknað: | KF/AMDO |
| Kannað: | |
| Dagfest: | 26.02.2009 |
| Mát: | - |

Broytt:

Tekning nr.: 01

INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

2009-0617/12
SG

Tórshavnar kommuna
Vaglið
Postboks 32
110 Tórshavn

22 SEP 2009
Journal

17. september 2009
Mál: 1830-023/09-7
Tygara skriv:
Viðgjørt: KHP

**Viðvíkjandi serstakari byggisamtykt fyri matr. nr. 1431 við Varðagøtu**

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13. frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 81 frá 25. mai 2009, hevur Tórshavnar kommuna sent Innlendismálaráðnum uppskot til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 1431 við Varðagøtu til góðkenningar.

Talan er um verkætlan, sum er framd í verki – bygging av 2 lonum við trimum íbúðum í hvørjari og felagsøki- og har fólk eru flutt inn.

Umhvørvisstovan noktaði at matrikulera ognirnar sundur. Avgerðin var kærd til kærunevndina, sum staðfesti avgerðina hjá Umhvørvisstovuni. Mælt var til at loysa málið við serstakari byggisamtykt og er hetta nú tað, sum verður gjørt.

Broytingin hevur sambært Tórshavnar kommunu ligið frammi frá 30. mars til og við 20. apríl 2009. Tá mótmælisfreistin var úti tann 20. juni 2009, var einki mótmæli innkomið.

Innlendismálaráðið hevur havt málið til ummælis hjá Býarskipanarnevndini, sum hevur latið Innlendismálaráðnum álit í málinum, dagf. 1. september 2009.

Innlendismálaráðið skal gera vart við, at tað ikki sýnist at vera fult samsvar millum kort- og tekstskjal viðvíkjandi disponering av felagsøkjunum og átalar at tilfarið, sum sent er til góðkenningar ikki er eyðmerkt, soleiðis at tað týðiliga sæst, at hetta er tað tilfarið, sum hevur ligið frammi og er viðgjørt av kommununi.

Viðmerkjast skal, at Innlendismálaráðið tekur undir við viðmerkingunum frá Býarskipanarnevndini, og vísandi til omanfyri standandi verður sagt frá, at Innlendismálaráðið, við heimild í § 4 í býarskipanarlógini, góðkennir at byggisamtyktin verður broytt sum omanfyri nevnt.

Hjálagt byggisamtyktartekstur og kortskjal fyri serstøku byggisamtyktina fyri matr. nr. 1431 við Varðagøtu við átekning frá Innlendismálaráðnum.

Vegna Innlendismálaráðið

Elsa Østergaard
ráðgevi

Postboks 159 · 110 Tórshavn · Tlf 306800 · faks 306885 · imr@imr.fo · www.imr.fo